# TAÐ HENDIR ...

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



## ÓKEYPIS AT KOYRA Í VÁGAR

Hetta vikuskifti kunnu fólk ferðast ókeypis í Vágatunlinum. Í Vágum plaga tey at gera nógv burtur úr teir dagarnar, tá ið tunnilin er ókeypis, og soleiðis er eisini hesaferð. Einki gjald verður tikið í Vágatunlinum frá leygarmorgni klokkan 6 og eitt døgn fram

**VAGATUNNIL ÓKEYPIS**
Leygardagin 5/3



## BÍÐA EFTIR GODOT

Hetta vikuskiftið eru seinastu regluligu sýningarnar av leikinum “Meðan vit bíða eftir Godot” á skránni á Meiaríinum. Hetta er ein av kendastu sjónleikunum yvirhøvur, og nú hevur Eyðun Johannesen staðið fyri nýggjari uppseting í Føroyum. Sjónleikurin tekur útgangsstøðu eitt kvøld við ein veg og eitt træ, har tveir mans bíða eftir Godot.

**MEÐAN VIT BÍÐA EFTIR GODOT**
Meiaríið í Havn
5/3 og &/3 kl. 18



## TALAN HJÁ KONGINUM

Hetta er søgan um mannin, sum alt í einum gjørdist kongur í Bretlandi, tí beiggi hansara mátti fara úr trúnuni, tí hann giftist fráskildari kvinnu. George 6. stamaði illa, og tí bæð hann um hjálp frá einum talupedagogi, tá ið hann skuldi halda sína fyrstu røðu til fólki. Filmurin er júst valdur til ársins film á Oscar hátíðarhaldinum og verður í hesum døgum sýndur í Havnar Bio.

**THE KING’S SPEECH**
Havnar Bio
Frá hósdegnum 3. mars



## LEGENDARISK PLÁTA Í NORÐURLANDAHÚSINUM

Leygarkvøldið verður Pink Floyd á skránni í Norðurlandahúsinum. Tað er íslendski rockbólkurin Dúndurfréttir, sum fer at spæla og fimm føroyskir solistar fara at sygnja. Solistarnir verða Anna Faroe, Konni Kass, Unn Paturson, Eyð B. Jacobsen og Anna Maria Olsen. Hetta er uppseting av tiltiknu útgávuni Dark Side Of The Moon, sum kom út í 1973. Útgávan er ein sokallað konseptfløga, sum byggir á tær royndir, ið bólkurin fekk á konsertferðum árini frammanundan.

**DARK SIDE OF THE MOON**
Dúndurfréttir og solistar
Norðurlandahúsið
Leygarkvøldið 5/3 kl. 19.00

## KLASSIKARI Í LIVERPOOL

Sunnudagin verður ein av klassisku fótbóltsdystunum í Onglandi spældur. Tey bæði mest vinnandi feløgini úr grannabýunum í útnyðringsonglandi bresta saman á Anfield Road í Liverpool. Manchester United stríðist fyri meistaraheitinum, meðan Liverpool serliga hugsar um at vinna sær rættin til europeiskan fótbólt komandi kappingarár.

**LIVERPOOL-MANCHESTER UNITED**
Premier League
Sunnudagin 6/3 kl. 13.30






## ÁRNI OG MARNAR Í SJÓNLEIKARHÚSINUM

Leygarkvøldið spæla Árni og Marnar til gamlamannadans í Sjónleikarhúsinum í Havn, og hetta er veruliga dansur fyri tilkomin, tí aldursmarkið er 40 ár. Tú skalt hava rundað tey fýrati fyri at sleppa inn í Sjónleikarhúsið hetta kvøldið at hugna tær.

**ÁRNI & MARNAR**
Sjónleikarhúsið í Havn
Leygarkvøldið 5/3 kl. 23